# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Egga verður forseti



Ítróttasamband fyri Brekað (ÍSB) hevur verið partur av norðurlendskum samstarvi síðan 1980.

Norðurlendska arbeiðið er samskipað í Nord HIF og verður stýrt av skrivstovu, sum limalondini skiftast um at hava um hendi trý ár hvørja ferð.

Á norðurlendska fundinum í Finnlandi 18. august í ár varð endaliga staðfest, at tað verða Føroyar, sum komandi trý árini hava um hendi hesa skrivstovu.

Formaður ÍSB, Egga Jensen, verður hetta tíðarskeiðið forseti í Nord HIF, Jón á Steig varaforseti, og Niels Nattestad er settur sum skrivari.

## Jákup spælir ikki aftur í ár

**Lærskaðin, ið hevur argað tað mesta av árinum, noyðir nú HB-liðskiparan at geva avboð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jjakup@sosialurin.fo*

Hesum hevur Jákup sjálvur boðað frá.

Tað merkir, at HB má vera liðskiparan fyriuttan seinastu fýra dystirnar av kappingarárinum, nú liðið stríðist um bronsumerkini.

Eisini merkir tað, at landsliðið má vera spælaran fyriuttan teir tríggjar komandi dystirnar, sum eru móti Fraklandi, Ukraina og Italia.

Avboðið kemur tí eisini illa við hjá landsliðsvenjaranum, sum undan seinasta dysti fekk avboð frá Marna Djurhuus, og tí valdi at nýta Jákup á vinstra bakki. Til komandi dystin hevur Atli Danielsen eisini leikbann, men hinvegin er Óli Johannesen tá tøkur.

# FM í fjallasúkkling

**Sunnudagin 23. september 2007 skipaði TSF fyri FM-kapping á fjallasúkklu. Greinin verður rópt criterium, og súkklað var runt Viðarlundina í Hoydølum á eini rutu uppá uml 1 km í 40 min**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Tað hevur ikki verið gjørt so nógv við fjallasúkkling higartil í Føroyum enn, men tað eru nakrir súkklarar sum brúka fjallasúkklu at venja á um veturin, og tað vóru nakrir av hesum sum møttu upp sunnudagin.

Fyrireikarnir høvdu valt ein tein at súkkla við nógvum hæddarmetrum og góður tekniskur førleiki á súkkluni var ein fyrimunur, og hóast brekkurnar á teininum ikki vóru so stórar so blivur tær strævnar eftir at hava súkkla tær fleiri ferðir.



*Hóast brekkurnar ikki vóru so stórar, so gjørdust tær strævnari fyri hvørt umfarið*

Vinnarin av kappingini gjørdist 42 ára gamli Gunnar Dahl-Olsen sum nú kann kalla seg føroyameistara í fjallasúkkling. Hann súkklaði 14 ferðir runt, og hann vann sannførandi á Eli J. Christiansen sum gjørdist nummar tvey. Andrass Joensen gjørdist nummar trý og Høgni Øster sum umboðaði Føroyar á Oyggjaleikum í fjallasúkkling endaði á einum fjóðra plássi, ein umgang aftanfyri Andrass.

Til barnakappingina møttu nøkur børn upp at kappast um FM-heiti í fjallasúkkling. Teirra teinur var ikki heilt so langur sum hjá teim vaksnu, men tað vísti seg at tað var strævið hjá teim flestu at koma runt av tí at tað var ein rættiliga drúgv brekka á rutuni, og onkrastaðni máttu tey leiða súkkluna.

Bólkur 1 súkklaði tríggjar ferðir runt og bólkur 2 súkklaði seks ferðir runt.

Enn er eru tríggjar FM-kappingar í súkkling eftir, og leygardagin leggja súkklaranir til brots at kappast um FM-heiti í landavegsúkkling.

**Úrslitini**
**Bólkur 1**

**Dreingir árg 2000 og aftaná**
1 Bartal Dam Gregoriussen
2 Tummas Simonsen

**Gentur árg 2000 og áftaná**
1 Theresa Reinert Ovenberg

**Bólkur 2**
**Dreingir árg '97-'99**
1 Niels Gilstein Midjord
2 Fríði Weihe Fríðmundson
3 Rasmus Mohr Nielsen

**Vaksin**
1 Gunnar Dahl-Olsen
2 Eli J. Christiansen
3 Andrass Joensen
4 Høgni Øster
5 Kári Simonsen
6 Sigmund Olsson
7 Evald Rasmussen

# Til Shanghai at kappast

**Special Olympics World Games (SOWG) verða í døgunum 2. -11 oktober 2007 í Shanghai í Kina. 10 ítróttafólk umboða Føroyar til leikirnar. Tey koma at kappast í frælsari ítrótt, boccia og svimjing**

SPECIAL OLYMPICS
*Tíðindaskriv*

Ítróttafólkini eru hesi: Í frælsari ítrótt: Júst í Túni, Maiken Olsen, Sharada Nielsen og Kristian Martin Garðalíð, í boccia: Elvin Weihe og Unn Mortensen og svimjararnir eru: Halla Poulsen, Apolonia Jústesen, Magnus V. Olsen og Ragnvvaldur Jensen

Hetta er aðru ferð, at Føroyar, sum hevur sjálvstøðugan limaskap í Special Olympics, luttaka á SOWG. Vit vóru eisini við í Dublin fyri 4 árum síðani. SOWG er eitt stórt ítróttatiltak, eini 7.500 íróttafólk úr øllum heiminum koma at kappast í 25 greinum. Umframt ítróttafólk og venjarar koma eini 40.000 sjálvboðin, ið á ymiskan hátt koma at hjálpa til áðrenn, undir og eftir leikirnar.

Leikirnir byrja við eini setan, har ítróttafólkini saman við venjarum og hjálparfólki koma at ganga í skrúgongu inn á olympiska leikvøllin. Hæddarpunktið á setaðnarhátíðini verður, tá tann olympiski eldurin verður borin inn.

Special Olympics (SO) er ein felagsskapur, ið ynskir at geva menningartarnaðum runt um í heiminum møguleika at luttaka í ítrótt, og at uppliva gleðini, sum fylgir við at vera ein luttakandi. Hetta ger, at ítróttafólkini styrkjast bæði til likams og sálar.

Stórur dentur verður lagdur á heilsustøðuna hjá ítróttafólkinum. Tí hava tey eisini møguleika at verða kannaði av serkønum undir leikunum. Hetta verður kallað Healthy Athelete Program.

Tað kann av sonnum sigast, at hetta er ein felagsskapur í stórari menning. Fyrstu leikirnir blivu hildnir í USA í 1968, har eini 1000 ítróttafólk luttóku. Í dag eru uml 2,5 mió ítróttafólk úr 165 londum knýtt at SO. Í Føroyum er SO knýtt at ÍSB.

Føroyska ferðalagið fer avstað longu hóskvøldið 27. septembur, tí leikirnir byrja við eini venjingarlegu frá leygardegnum. Komið verður heimaftur mánakvøldið 15. oktobur við Atlansflog.

Leikirnir hava egnu heimasíðu: www.2007specialolympics.com

Eisini ber til at lesa meira um Special Olympics á www.specialolympics.org

## Lundberg hevur skift felag

Á vikuliðnum í gjár høvdu vit valt Christian Lundberg til ein av álopssessunum. Hetta hevði hann ivaleyst eisini uppiborið eftir góða avrikið í Klaksvík. Men tað er nú ikki í KÍ, at Lundberg ger um seg, soleiðis sum tað framgongur av vikuliðnum. Danski áleyparin spældi kanska við KÍ í fjør, men í ár er tað altso GÍ, sum hevur gleðina av mongu málum hansara. Vit biðja Christiatn og lesaran um umbering fyri mistakið.